100 ár

N‡liga komin í Realskúlan í Havn

Víkin fyri eystan

Fyrst var ta› søgnin um sjónir og hoyrslur, sum menninir høvdu
eystur í møl, tá i› fátt var fólk ella miki› var myrkur
– lunnaskrambul í myrkri og huldubátar vi› manning,
sum fóru burt ella komu, og menninir høvdu til merkis.

– – –

Sí›ani sá eg víkina, óvígd tóktist hon vera,
alt var so ramt og so hei›i› og landi› sum rangan á oynni,
vátur var bakkin og benini ljótasta skri›ulendi,
óløgi bólta›u inn vi› tungum tonglum frá botni,
vatnriki› gamalt slógv barst oman og grótha›ir konglar
– gongulag sítt fekk áin av bøllutum malargróti. –
So var, tá bátur var burt ella menninir farnir til húsa
– ikki var meira ónomi› land í allari oynni.

– – –

Útfyri stø›la›ist fiskur og stó› til mi›is um skallar,
hann søktu brimvátir menn, sum løgdu frá landi á morgni
– teir vandust dreingir á vás, sum ættin møddist av elli,
nutu har fong ella feig›, sum lagna og líkindi lógu.

– – –

Her kom fiskur á land, og hi›an var› fari› at fleyga
ni›an um burtkrógva› nev á streymmjúkum sjógvi á ur›ar
– grøtandi grønt var har grasi›, og gróti› og gloprini uddu
av tí ótarna›a lívi, sum er undir albygdum bjørgum.

»Úr Leikum og loyndum«, 1940

Kúvingaskelin

Vi› einum djørvum smíli hyggi eg inn í meg sjálvan
og taki hjarta mítt í lógvan. Skelvandi
tr‡sti eg d‡rgripin av oyranum og lurti.

Ta› er mær fyri sum eg haldi í hondini
eina kúvingaskel
og hoyri úr henni
langt og óskilligt su›
av ókendum sjógvi.

Á, man eg vinna fram,
vinni eg eina fer› fram
av strondini á tí havi eg í dag
havi grun av, men ikki síggi?

T‡tt eftir Lucian Blaga: »Tólv yrkingar«, 1982

bera saman vi› annan og eldri eysturlendskan skaldskap.

Eru yrkingarnar ella ørindini frá 1970-árunum n‡ggj uttan á skræ›uni, so er evni› í teimum als ikki n‡komi›. Ta› er – framvegis – skaldsins kensla av rúmd og endaloysi, sum av n‡ggjum fær mál. Yrkingarformurin hóskar væl til nettup hetta evni›: mótsetningin ímillum ta› farandi og ta› ver›andi, spenni› ímillum lívsins avmarkan og lívsins endaloysi, sum eru høvu›smotiv ella tema í hesum ørindum:

Lítilláta›
mest sum tú vart ikki til
birti tú í hugum mildan yl
Hann er eftir
Og tú ert ikki til

•

Ungur var Chr. Matras, hann fór at yrkja í álvara. Tí›liga var hann fullbúgvi› skald, og bla›ungur gjørdi hann summar av sínum minniligu tilveruyrkingum. Bara 19 ára gamal skapa›i hann yrkingina *Hitt blinda li›i›*, og ári› eftir yrkti hann *Ve›urtrøll* og *Eg sigi tær satt.* Sostatt skriva›i hann longu á 19-20 ára aldri tríggjar megintilveruyrkingar í skaldskapi sínum.

Tær eru ikki so øgiliga mangar í tali og rúgva ikki heldur ta› heilt nógva, yrkingarnar hjá Kristjani Matras. Hann var vandin í síni yrking sum í ø›rum arbei›i. Ta› kom meira enn so fyri, at hann hev›i einstakar yrkingar leingi í ger›, leg›i frá sær og tók tær kanska upp aftur mong ár seinni.

Heildarsavn vi› upprunayrkingum og t‡ddum kom í 1975: *Leikur og loynd,* sum Emil Thomsen gav út. Eftir hetta sonevnda heildarsavn komu, ta› eg veit um, av skaldsins egnu yrkingum: *Úr sjón og úr minni*, 1978 (onnur útgáva 1979), og av t‡ddum yrkingum eru enn at nevna: *N‡ggjar t‡›ingar,* 1981 (egi› forlag) – yrkjararnir í hesum savni eru Miroslav Holub úr Kekkia, Zbigniew Herbert úr Póllandi, Robert Burns úr Skotlandi, Georg Trakl úr Eysturríki, Salvatore Quasimodo úr Italia, W.B. Yeats úr Írlandi – og at enda *Lucian Blaga: Tólv Yrkingar* (egi› forlag, 1982). Alt samalt eru hetta merkisverd avrik. Gle›iligt er ta›, og undranarvert, at skaldi› Chr. Matras, sum tann sanni listarma›ur hann var, so leingi hann orka›i, alsamt gjørdi n‡ggjar royndir og troddi á›ur ógongdar gøtur, bæ›i í egnum skaldskapi og í sínum t‡›ingum.

Ta› bla›unga skaldi› Chr. Matras grundar í nøkrum av sínum fyrstu yrkingum um lívsins stóru tilveruspurningar. Tann elligamli yrkjarin spyr seg sjálvan, um skaldsins dreymur kanska er ein døggdropi, i› h‡sir allari ver›ini? – Tá ver›ur úrfáningur skaldsins, ella samanumtøka, yrkingar ella ørindi av hesum slagnum, sum í síni søgn og sínum úts‡ni gera so manga a›ra yrking óvi›komandi og tarvleysa:

Ljósi› og sjógvurin
byrja›u í fyrndini
eitt spæl saman
Ta› heldur á inn í ævinleikan

– Mamma, kunnu vit fara í SMS at keypa Pokémon kort?, – Mamma, eg vil fáa Pokémon kort! – Mamma, eg SKAL hava Pokémon kort!!! – Gotta catch'em all!

Eg fái gron av Pokémon

Urd Johannesen

Solei›is ver›ur júka› í mi›al tvær fer›ir um vikuna, og munnu ikki fleiri mammur (og pápar…) kenna seg aftur í hesari stø›u?

Hetta er tann vanliga trítrinsfasan hjá børnum, sum vilja hava eitthvørt. Í sagnor›um l‡st stutt og greitt: *kann, vil, skal.* Og, sum grundgeving fyri at kunna, vilja og skula, er eitt anna› snilt trítrins-fasa , sum í ser- og felagsnøvnum kundi ljó›a› naka› solei›is:

»Hanus og Janus eiga ein ***sooo*** stóran bunka av Pokémon kortum«, »hinir dreingirnir í klassanum, eiga nógv meira kort enn eg«, og »øll børnini eiga eisini bøkur og sjónbond um Pokémon«.

– Gotta catch'em all!

Tjaki› gongur aftur og fram inntil mamman um sí›ur gevur skarvin yvir. Túrurin gongur ni›an í SMS. Enn einafer› er ta› eydnast barninum, at yvirtala mammuna. Enn einafer› grópar mamman ni›ur í lumman eftir teim 7,95 krónunum, sum er kostna›urin á hesum vælsigna›a pakkanum vi› trimum pokémon kortum og tveimum bubbligummum (sum ver›a tveitt vekk, tí tey smakka so illa). Aja, ta› er kanska ikki so nógv allíkavæl, uggar hon seg vi›, tó uttan at hava orku til at rokna út, hvussu nógvar pengar, hon hevur brúkt uppá Pokémon sí›ani henda landaplágan kom fram.

Á›renn vit vita av, eru vit drigin inn í eitt framúrskarandi vælskipa› markna›arføringstól, sum spælir vi› nakrar grundleggjandi kenslur hjá okkum menniskjum; at vit mugu ikki ver›a annalei›is ella verri fyri enn hini. Høvu›sendamáli› vi› slíkum landaplágum tykist vera at fáa fólk at keypa einkisigandi leikur ísta›in fyri mjólk og brey›. Ájavnt vi› ney›sinjavørur, sum ísta›in fyri at gera okkum fysisk mett gera okkum sálarliga svong. Meira meira. Gotta catch'em all.

Á veg heim úr SMS ynskti eg (innantanna›) hetta pokémon fyribrigdi› av hundan og til og hugsa›i um, hvør ta› kann vera, sum finnur uppá slíkar plágur. Kann ta› veruliga vera vaksin fólk, og kanska enntá foreldur, sum sita hinumegin jør›klótuna og gera slíkar rá›ager›ir ímóti teirra sameindu? Íme›an mínir illu tankar fer›ast 'over there' til klóku uppfinnararnar, gongur vælnøgdi sonurin vi› sí›una av, og hevur spentur skrætt ta glinsutu bláu innbjálvingina av og hyggur eftir teim trimum kortunum. Stórt skuffilsi er nú at síggja í tí fyrr so spenta andlitinum. Hann eigur øll kortini frammanundan, og bubbligumm-ini smakka framvegis av hundan og til. Men hvat er anna› at gera enn at royna aftur ímorgin?

– Gotta catch'em all!

Eg ynski meg aftur til tí›ina, á›renn Pokémon var til. Men skjótt gongur upp fyri mær, at tá vóru a›rar plágur. Jojo's, Bøllar, Nintendo, Turtle, Barbie, Actionman fyri at nevna nakrar í bíligara endanum. Í d‡rara endanum eru ta› súkklur, play-station, teldur, rulluskoytur - ráki› fer›ast líka so skjótt sum ta› allar n‡ggjasta - rennihjólini - og skjótari enn okkara orka at smí›a føroysk heiti, sum hóska til.

Hvat er gali› vi› høsnarringum? Hví kunnu børn í dag ikki lata sær lynda av teim fittu og vandaleysu høsnaringunum eins og vit gjørdu, tá i› vit vóru smá? Svari› er at finna í einum or›i›, sum sigur alt:

– Cool!

Ta› ber ikki til at vera cool uttan at eiga alt ta›, sum krevst fyri at vera cool. Cool er her og nú, og ikki ígjár. Plágurnar koma og fara, men ta›, sum altí› stendur eftir og arvast eru allar tær kenslur, sum finnast í hesum av útsjónd sakleysa or›inum.

Nú ein dagin kom so fyrsta glæsiliga BR-katalogi› inn um hur›ina. Eitt satt ævint‡r vi› alskins litføgrum leikum, eisini Pokémon. Sonurin hevur gjørt ein langan ynskilista til jóla. Spurningurin er so bert, um jólama›urin í ár kennir seg noyddan at fylgja vi› »Gotta catch'em allrákinum«, ella um hann tekur teir bleytu pakkarnar framum. Teimum dáma okkum foreldrum so væl. Kanska man skuldi tiki› eitt prát vi› jólamannin.

Úr tølandi tykisheimi Pokémons

Yvirskriftir úr blø›um (tiki› úr alnetinum)

Pokémon-crazy Turkish boy jumps from building, breaks leg
(Ankara Post)

Man caught stealing Kids' Pokémon Cards
(APBnews)

Vatican catches Pokémon fever
(The Times)

2nd Death blamed on Pokémon Ball
(Washington Post)

Mothers busted in bus stop Pokémon Brawl
(APBnews)